*Fiskirannsóknarstovan hevur nú kannað hjáveiðina av øðrum fiskasløgum, sum er uppi í svartkjaftaveiðini, tá ið roynt verður við flótitroli. Kanningarnar fóru fram umborð á Nærabergi í november og desember í fjør*



# Hjáveiðan við flótitroli ger tað neyðugt at fáa ristina at rigga

**Fiskirannsóknarstovan hevur nú sett tøl á, hvussu stór hjáveiðan av øðrum fiskasløgum er uppi í veiðini hjá skipi, sum roynir við flótitroli. Veiðan hjá Nærabergi ein túr, sum skipið gjørdi í november og desember, er kannað. Kanningarnar vísa, at fitt av upsa er uppi í svartkjaftaveiðini við flótitroli, meðan minni íblanding er av toski og øðrum fiskasløgum**

HJÁVEIÐA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í fjør høvdu vit fleiri greinar í blaðnum um, hvørt hjáveiðan hjá svartkjaftatrolarunum kann vera ein trupulleiki fyri onnur fiskasløg ella ikki. Vit høvdu samrøður við leiðaran á Fiskiveiðieftirlitinum, Elmar Højgaard, Hjalta í Jákupsstovu, leiðara á Fiskirannsóknarstovuni, og vit høvdu eisini samrøður við landsstýrismannin, Bjørn Kalsø, um hesi viðurskifti.

Spurningurin tók seg upp eftir, at eitt nú íslendingar høvdu gjørt kanningar av hesum viðurskiftum og staðfest, at ein ávís hjáveiða er uppi í veiðini hjá svartkjaftaskipunum.

## Teori um gongd

Menn, sum eru virknir í ísfiskavinnuni í Føroyum, hava stundum spurt, hvar tann stóri fiskurin er, eitt nú tann stóri upsin, nú Várharra hevur vælsignað okkum seinastu árini við metgóðari upsaveiði, samstundis sum upsin hevur verið rættiliga smáfallandi.

Spurt hevur verið, um tann stóri fiskurin kanska gongur uppi í svartkjaftinum, nú gróðurkanningar seinastu árini hava víst, at gróðurin í havinum hevur verið so lítil, tó at hann í fjør heyst aftur vísti seg at vera á veg uppeftir.

Í samrøðum, vit høvdu við Elmar Højgaard, helt hann, at kanningarnar, sum higartil vóru gjørdar, vóru ikki nóg gott grundarlag til at meta um hesa hjáveiði.

Hann vísti á, at lítil fiskiskapur hevði verið eftir svartkjafti í føroyskum sjógvi, síðan kanningarnar byrjaðu og legði dent á, at Fiskiveiðieftirlitið fór at taka kanningarnar uppaftur, tá ið meira svartkjaftur aftur fekst á okkara leiðum.

Sum skilst, hevur spurningurin um hjáveiði uppi í svartkjaftafiskiskapinum afturvendandi verið havdur á munni á løgtingi, og landsstýrismaðurin hevur í orðaskifti fleiri ferðir verið spurdur, hvussu stór henda hjáveiða í veruleikanum er.

## Nýggjar kanningar

Fiskirannsóknarstovan hevur nú í tíðarskeiðnum, 10. november til 7. desember kannað hjáveiðina við flótitroli hjá svartkjaftatrolaranum, Nærabergi.

Niðurstøðan er, at umframt hjáveiði av prikkafiski og øðrum smáum uppisjóvarfiskum, var upsi eisini uppi í veiðini hjá svartkjaftatrolaranum.

Tað kann ljóða lítisvert, tá ið hjáveiðan av øðrum fiskasløgum er so lítil, sum tølini vísa, men havast skal í huga, at nøgdirnar, sum svartaskipini fiska, eru so stórar, at tey fáu prosentini skjótt kunnu gerast til stór tøl, tá ið saman um kemur.

Fiskirannsóknarstovan sigur, at hjáveiðan av upsa hjá Nærabergi hendan túrin var 3,2% í miðal.

- Men spjaðingin var stór. Eingin upsi var í onkrum hálum, og eitt hálið var hjáveiðan heili 20%.

Samlaða hjáveiðan av upsa hendan túrin var 129.000 pund.

- Upsin var yvirhøvur stórur - í miðal 77 sentimetrar til longdar og vigaði í miðal 4,7 kilo.

Magakanningar vístu, at upsin, sum gekk uppi í svartkjaftinum, serliga hevur etið svartkjaft, prikkafisk og æti.

## Lítil toskur

Fiskirannsóknarstovan sigur, at hjáveiðan av toski uppi í svartkjaftaveiðini hjá Nærabergi hendan túrin var 0,02%, sum svarar til 772 pund.

- Nøgdin av toski er minni enn í íslendsku kanningunum, sum gjørdar vórðu í 2003.

Toskurin var í miðal 74 sentimetrar til longdar og vigaði í miðal 9 pund.

- Kanningarnar vístu, at toskurin hevur etið nógvan svartkjaft, og onkur fiskur hevði eisini etið prikkafisk og lítla lakstobis.

## Onnur hjáveiða

Á túrinum hjá Nærabergi kannaði Fiskirannsóknarstovan eisini nøgdirnar av hjáveiði av øðrum fiskasløgum, og her var hjáveiðan av prikkafiski 0,3 % ella 11.600 pund, hjáveiðan av lítla laksatobis 0,2 % ella 8.000 pund og hjáveiðan av agnhøgguslokki 0,3 % ella 11.800 pund. Hjáveiðan av øðrum fiskasløgum var í smáum nøgdum; onnur fiskasløg vóru bert uppi í veiðini av og á.

## Mæla til rist

Eftir túrin hjá svartkjaftatrolaranum, Nærabergi, mælir Fiskirannsóknarstovan til at skunda undir royndirnar at fáa rist til flótitrol at rigga sum skjótast, soleiðis at ristin kann skilja tann stóra fiskin frá tí smáa, ið fiskað verður eftir.

Fiskirannsóknarstovan heldur, at hjáveiðukanningar eisini mugu gerast fyri onnur tíðarskeið av árinum fyri at fáa eina betri mynd av hjáveiðuni hjá svartkjaftaflotanum.



*Fiskirannsóknarstovan mælir nú til at skunda undir royndirnar við rist til flótitrol, soleiðis at ristin kann skilja tann stóra fiskin frá tí smáa, ið fiskað verður eftir*